# Velja foreldraumboð í skúlastýrini í Tórshavnar kommunu

Valið verður í Argja skúla, Eysturskúlanum, Hoyvíkar skúla, Kaldbaks skúla, Kollafjarðar skúla, Kommunuskúlanum, Sankta Frans skúla og Venjingarskúlanum **mánadagin 28. mai 2001, kl. 14.00-20.00**

Veljarar, sum ikki kunnu møta valdagin, kunnu venda sær til skúlaleiðaran, sum er formaður í valnevndini, at sleppa at atkvøða við brævatkvøðu í seinasta lagi kl. 18.00 dagin fyri valdagin.

Taðskulu veljast trý foreldraumboð til hvønn skúla, og sita tey í skúlastýrinum í trý ár.

Foreldraumboðini, ið eru uppstillað til skúlastýrini:

**Argja skúli**

| | |
|---|---|
| Knud Bjørk | Stóðlagøtu 19 |
| Valbjørn Dalsgarð | Rygsgøtu 20 |
| Ragnfrí Danielsen | Leitisgøtu 24 |
| Kristian Johansen | Reynsgøtu 6 |
| Elin Olsen | Stóðlagøtu 10 |
| Marita Simonsen | Stóðlagøtu 15 |
| Elin Norðberg | |
| Wenningsted Tausen | Bakkagøtu 1 |

**Eysturskúlin**

| | |
|---|---|
| Connie Dalsgaard | Framman fyri Garðar |
| Halldóra Dam | Turiðargøtu 6 |
| Snorri Fjallsbak | Vípuvegur 23 |
| Vivian Guðmundson | Turiðargøtu 12 |
| Súsanna Helmsdal | Mýrisnípuvegi 38 |
| Hans Jacob Hermansen | Tórsbyrgi 16 |
| Jan Jakobsen | Tjarnarlág 12 |
| Olga Knudsen | Kristiansgøtu 9 |
| Augusta Mikkelsen | Tórsbyrgi 28 |
| Jákup Páll Mohr | |
| Mortensen | Mýrisnípuvegi 1 A |
| Dánjal Petersen | Inni í Firði |
| Malan Poulsen | Geilartúni 10 |
| Karl Eli Sigvardsen | í Lágni 8 |
| Dagmar Andrea Svabo | Tjarnardeild 2 |

**Hoyvíkar skúli**

| | |
|---|---|
| Marita Danielsen | Skraddaragøtu 18 |
| Durita Djurholm | Kristiansgøtu 26 |
| Maiken Drangberg | Jørundargøtu 65 |
| Osvald Joensen | Aggusteinsvegi 3 |
| Turið H. Magnussen | Djúpagilsvegi 30 |
| Johan Petur Michelsen | millum Gilja 72 |
| Lis Mortensen | Niðarugøta 84 |
| Niels Winther Poulsen | millum Gilja 8 |
| Elsa Thomsen | millum Gilja 115 |

**Kaldbaks skúli**

| | |
|---|---|
| Snorri á Bøgarði | á Bø |
| Jann Johannesen | á Gørðum |
| Kaj Johannesen | á Fløtum |
| Sigurd Poulsen | |
| Jensa Samson | |
| Annfinn Vang | á Gørðum |
| Hildur Vang | á Fløtum |

**Kollafjarðar skúli**

| | |
|---|---|
| Rólant Christensen | Norðuri í Sundum |
| Connie Dalsgaard | Framman fyri Garðar |
| Magna Hammer | í Líðini |
| Dorthea Joensen | Signabø |
| Thea Joensen | Heygavegi 3 |
| Oddvald Olsen | í Útibø |
| Hjørdis H. Petersen | Inni í Firði |

**Kommunuskúlin**

| | |
|---|---|
| Birna Bærentsen | Fjalsgøtu 28 |
| Sigrun Danielsen | Gundadalsvegi 29 |
| Lissi Hansen | millum Horna 4 |
| Svanna Hanusardóttir | Árgeil 10 |
| Andrea Heindriksdóttir | Dalavegi 3 |
| Diana Jóanesarson | Fjalsgøtu 18 |
| Dia Midjord | Perskonugøtu 12 |
| Høgni Mohr | Bjarnoyarvegi 7a |
| Vár í Ólavsstovu | Heiðavegi 14 |
| Katrin Petersen | Hoydalsvegi 30 |
| Edny Poulsen | Varðagøtu 27 |
| Robert Vilhelmsen | Brøttubrekku 33 |

**Sankta Frans skúli**

| | |
|---|---|
| Birgit Debess | Tvørgøtu 11 |
| Heini Eysturoy | Vesturgøtu 1 |
| Peter Gram | Tórsteinsgøtu 4 |
| Ingvør í Haraldsstovu | C. Pløyensgøtu 10 |
| Finnur Lützen | Mariugøtu 12 |

**Venjingarskúlin**

| | |
|---|---|
| Jónveig Arge | Mattalág 19 |
| Connie Dybczak | Tjóðhildargøtu 4 |
| Marjun Jacobsen | Faksagøtu 2 b |
| Óluva Johannesen | J. Dahlsgøtu 1 |
| Gunri E. Johannesen | Blankagøtu 10 |
| Suni Petersen | J. C. Svabosgøtu 27 |
| Torkil Zachariassen | oman Mattalág 10 |

**Nýggju skúlastýrini taka við 1. august 2001**

**Tórshavnar kommuna**
**Mentamáladeildin**

---

**Bláí Krossur Føroya søkir**

# Fyristøðufólk til Blákrossheimið

Av tí at fyristøðufólk okkara á Blákrossheiminum fer úr starvi 15. juli 2001, søkja vit eftir nýggjum fyristøðufólki at byrja 1. juli 2001 ella so skjótt sum til ber.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- Dagligu leiðsluna av Blákrossheiminum, herundir eisini tí fíggjarliga
- At tryggja búfólkunum góð og lívilig kor
- At menna starvsfólkini
- At samstarva við stýrið fyri heimið og annað virksemi í Bláa Krossi
- At samstarva við aðrar stovnar og almennar myndugleikar

**Førleikakrøv:**
- Hóskandi fakliga útbúgving og leiðsluroyndir
- Kunnleika til málbólkin
- Góð samstarvsevni og hegni at skipa fyri og leiða arbeiði
- Góð evni at býta út uppgávur og at stimbra starvsfólkunum
- Kann, í samstarvi við starvfólkini, menna heimið fakliga
- Góð evni at lurta
- Tekur undir við tí sum Blái Krossur stendur fyri, hugsjónarliga og andaliga

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og gevandi arbeiðsumhvørvi og ágrýtin starvsfólk
- Persónliga menning gjøgnum skeiðluttøku
- Samband og samstarv við onnur starvsfólk í landsfelagsskapinum
- Eitt leiðarastarv lønt sambært avtalu millum Blákrossheimið og Fíggjarmálastýrið

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Bláa Krossi Føroya í hendi í seinasta lagi 18. juni 2001.

Umsóknir skulu sendast til:
**Bláa Kross Føroya**
att. Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivari
Glyvravegur, 625-Glyvrar.

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja til skrivstovuna hjá Bláa Krossi tlf. 449343 og tosa við Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivara.

Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri. Á heiminum eru 11,5 starvsfólk. Pláss er fyri 15 búfólkum. Eisini eru búfelagsskapir og eftirviðgerð knýtt at heiminum. Blákrossheimið verður fíggjað við árligari játtan frá landsstýrinum.

Blái Krossur Føroya er ein kristiligur fráhalds- og hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

**Blái Krossur Føroya**
Glyvravegur, 625 Glyvrar
tlf. 449343, fax: 449353
t-postur: blakross@blakross.fo
www.blakross.fo

---



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Skrivstovufólk barnsburðaravloysari

Á starvsfólkadeildini, ið umsitur starvsfólkaog lønarviðurskifti, er eitt fjølbroytt og spennandi starv leyst til setan skjótast til ber. Rætti umsøkjarin kemur at taka tær av nógvum ymiskum og avbjóðandi uppgávum. Tøkniliga er kommunan sera frammarlaga við m.a. e-mail samskifti, elektroniskari lønar-, journal- og starvsfólkaskipan.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovu- ella líknandi útbúgving og vera til reiðar at taka sær av nógvum ymiskum uppgávum. Kunnleiki til edv á brúkarastøði er neyðugur.

**Setunarviðurskifti**
Starvið tíðaravmarkað fulltíðarstarv sum verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Tórshavnar kommunu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa (janus@torshavn.fo), ella Oskar Neshamar, fyristøðufólk (oskar@torshavn.fo), tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 11. juni 2001. Merk umsóknina "Starvsfólkadeildin".

Á starvsfólkadeildini, starvast í løtuni fýra fólk. Harumframt eru tveir næmingar knýttir at deildini. Deildin umsitur tey umleið 900 starvsfólkini hjá kommununi.

SNARSKIVAN

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum til Dagstovnin Lítlaskóg.

**Størvini**
Talan er um eitt barnsburðarstarv 30 tímar um vikuna í vøggustovu, eitt barnsburðarstarv og eitt avloysarastarv 35 tímar um vikuna í barnagarðsstovu. Størvini eru øll tíðaravmarkaði fyri eitt ár.

**Stovnslýsing**
Á Lítlaskógi ganga 88 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum vøggustovum við 10 børnum og fýra barnagarðsstovum við 17 børnum, av hesum er ein stova skipað við 6 ára gomlum børnum.

**Vit bjóða**
trý áhugaverd størv, har umsøkjarin fær møguleika at gera sína ávirkan á stovnin.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin
- er útbúgvin pedagogur
- hevur góð samstarvsevni
- er røkin, álítandi og nærlagdur
- er førur fyri at taka avgerðir í arbeiðnum, og er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- dámar væl at vera úti í náttúruni saman við børnum

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 1. august 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Frígerð Sundsskarð, leiðara, ella Heidi Matras Justinussen, varaleiðara, tlf. 31 91 31.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Lítlaskógi, postrúm 217, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. juni 2001.

SNARSKIVAN

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar og hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir fólki til Frítíðarskúlan í Kollafirði.

**Størvini**
Talan er um pedagog- og hjálparfólkastørv, 25 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing**
Í Frítíðarskúlanum í Kollafirði, sum heldur til í Skótahúsinum, ganga 25 børn. Karmarnir eru góðir. Økið rundan um er barnavinarligt og stutt er bæði í fjøru og haga.

**Vit bjóða**
tvey áhugaverd størv í einum grannalagi, har náttúran og ítróttur hava stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við virðing fyri tí einstaka barninum
- er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúlan
- tímir at vera úti saman við børnunum

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 6. august 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Maluna Jógvansdóttir, leiðara, tlf. 42 13 23, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Frítíðarskúlanum í Kollafirði, 410 Kolljafjørður, í hendi í seinasta lagi 15. juni 2001.

SNARSKIVAN

---

# Skúlastýrisvalið í Nes kommunu

Tey, ið enn ikki hava skrásett seg til vallistan, kunnu gera hetta við at venda sær til skúlastjóran í seinasta lagi 21. mai.

Seinasta freist at lata valevnislistar inn er 21. mai kl. 18.00.

Atkvøðugreiðsla til skúlastýrið verður 28. mai frá kl. 14.00 til 20.00. Valið fer fram í valhølinum hjá Nes Kommunu.

Veljarar, sum ikki kunnu møta valdagin, kunnu við at venda sær til formannin í valnevndini atkvøða við brævatkvøðu í seinasta lagi kl. 18.00 dagin fyri valdagin.

**Valnevndin**

---

**Kvívíkar kommuna**

# Val til skúlastýri 28. mai 2001

Valevnislisti til skúlastýrið við Leynar Skúla

Anna Petersen, Leynar
Esther M. Poulsen, Leynar

---

# Blái Krossur Føroya

Útsetti aðalfundurin verður á Runavíkar Sjómansheiminum týskvøldið 20.05.2001 kl. 19.30. Skrá sambært viðtøkum felagsins.

**Landsnevndin**